Afturhaldsins „syndaregistir“ í invalitu- og ellisrentumálinum síðani 1921.

Eitt tungt og dapurt „registar“ hjá sambandinum og sjálvstýrinum at standa til svars fyri.

Saunleikin um flokkanna støðu til invalidu- og ellisrentumálið og onnur social mál prógvaður við endurprentan úr løgtingstíðindum.

(Framhald.)

Í seinasta blaði vístu vit á, hvussu fhaldsflokkarnir, sambandið og sjálvstýrið 1921 høvdu skotið invaliturentumálið út.

Hesa ferð vilja vit úr løgtingstíðindum endurprenta teirra støðu í nøkrum av teim fylgjandi árum.

Løgtingstíðindi 1922:

»Lov om Aldersrente.

Den 8. August fremlagdes Skrivelse fra Færø Amt angaaende Udvidelse til Færøerne af Lov om Aldersrente.

— — —

Den 18. September afgav Udvalget saalydende Betænkning:

Undertegnede Udvalg, der har faaet nærværende Sag til Behandling, skal udtale, at ihvorvel der trænges til reformerende Ændringer i de for Færøerne gældende Lovbestemmelser om Alderdomsunderstøttelse, er man paa nærværende Tidspunkt næppe i Stand til at fremsætte et Forslag til Anordning, hvorved Loven sættes i Kraft paa Færøerne . . .

Forslag.

1) Lagtinget anmoder Amtmanden om til næste Aars ordinære Samling at indhente fuldstændige Oplysninger om, i hvilket Omfang den nugældende Lov om Alderdomsunderstøttelse anvendes paa Færøerne.
Og at tilvejebringe statistiske Oplysninger om, hvor mange Personer over 65 Aar, der findes paa Færøerne, disses Livsstilling, Indtægts- og Formueomstændigheder m. m. samt deraf uddrage en Skønsmæssig Oversigt over, hvor mange af disse, der kan antages at falde indenfor de Grænser, der berettiger til Nydelse af Aldersrente.
Endelig anmoder Lagtinget Amtmanden om til næste Aars ordinære Samling at foranledige udarbejdet et Forslag til Anordning, hvorved Lov om Aldersrente kan sættes i Kraft paa Færøerne.
2) I øvrigt udsættes Sagen til næste Aar.

(Teir, ið settu fram hetta uppskotið, vóru: Matras, Edw. Mitens, Johan Poulsen, J. H. Poulsen, og R. Rasmussen.)

Invalideforsikringsloven.

Ved Lagtingets Aabning den 29. Juli fremlagdes den fra sidste Aar udsatte Sag om Invalideforsikringsloven.

— — —

Den 10. August fremlagde Udvalget saalydende Udvalgsbetænkning.

Udvalget har delt sig i et Flertal og et Mindretal.

Flertallet (Matras, Mortensen (Mitens), Johan Poulsen (fólkatingsmaðurin) og J. H. Poulsen skal udtale Man foreslaar derfor, at Spørgsmaalet udsættes.

Mindretallet (R. Rasmussen) henviser til sine Udtalelser i den i sidste Samling afgivne Betænkning og stiller Forslag overensstemmende hermed.

Forslag.

1) Fra Flertallet (Matras, Mitens, Johan Poulsen og J. H. Poulsen:
Sagen udsættes indtil videre.
2. Fra Mindretallet (R. Rasmussen):
Forslag til Anordning, hvorved Lov Nr. 253 af 6. Maj 1921 om Invalideforsikring sættes i Kraft paa Færøerne med følgende Ændringer.
(Her koma so broytingarnar í 2 §§).

Ved Sagens 2. Behandling den 12. August fremlagdes Ændringsforslag til Flertallets Forslag fra Edw. Mortensen:

I Stedet for Flertallets Forslag sættes:

Sagen udsættes til næste Aar.

Mindretallets (R. Rasmussens) Forslag sattes under Afstemning, men bortfaldt, idet 8 stemte for og ingen imod (stemte ikke: Winther, Mortensen, Patursson, J. H. Poulsen, Matras, Johan Poulsen, A. Samuelsen, Tórgarð, M. Samuelsen, Joensen, Dahl, Effersøe, Formanden. Fraværende: Joen Poulsen).

Herefter vedtoges Ændringsforslaget med 19 Stemmer mod 0.«

Tað er at bíta merki í, at av monnum, sum enn eru uppi í politikki, kunnu nevnast J. Patursson, A. Samuelsen og fólkatingsmaðurin J. Poulsen, sum aftur hesa ferð niðurstemmaðu invaliturentuna.

Hesir menn vóru eisini á hesum sinni við til at forða ellisrentuni at koma í gildi í Føroyum.

Løgtingstíðindi 1923:

IV. Invalideforsikringsloven.

. . . (Vit leypa um uttanumsveipið viðvíkjandi avvísingini og taka bert uppskotið, undirskrivað av m. a. Edw. Mortensen, Joh. Poulsen og Samuelsen).

Forslag.

1) Sagen udsættes til næste Aar.
2) Amtmanden anmodes om til næste Aar at forelægge Tinget Oplysninger om, hvilke økonomiske Byrder Loven, hvis den sættes i Kraft, vil medføre, samt om hvormange Individer her paa Øerne kan antages at ville falde ind under Loven om forsikrede.«

VI. Lov om Aldersrente.

. . . (Vit leypa uttanumsveipið um og taka bara uppskotið).

Forslag.

1) Sagen udsættes til næste Aar.
2) Amtmanden anmodes om at gøre de kommunale Styrelser bekendt med nærværende Betænkning.

Skrivað undir hava: Edw. Mortensen, Johan Poulsen, J. H. Poulsen, R. Rasmussen og A. Samuelsen.

Bít merki í: Edw. Mitens, Johan Poulsen fólkatingsmaður og A. Samuelsen. Hava til onga tíð hoyrt hesar menn siga, at teir hava arbeitt fyri ellisrentuni?

1924.

»Invalideforsikring.
(Vit taka bara uppskotið.)

Forslag.

1) Sagen udsættes til næste Aar.
2) Amtmanden anmodes om til næste Aars Lagting
a) at tilvejebringe en Udtalelse fra alle Sygekasserne, efter at Sygekassebestyrelsen har behandlet Spørgsmaalet om Lovens Ikrafttræden paa ordinære Generalforsamlinger.
b) hvar mange Individer her paa Øerne vil falde ind under Loven, og hvilke økonomiske Byrder Loven vilde paaføre Sygekasserne Arbejdsgiverne og Kommunen.

Det kommunale Udvalg, den 5. August 1924.

O. F. Joensen (Ordfører), J. H. Poulsen, M. Samuelsen.

Hesa útsetan viðtóku flokkarnir, ið tá ráddu fyri borgum. Neyðar avlamisfólk.

7. Lov om Aldersrente.
(Vit taka bara uppskotið.)

Forslag.

1) Sagen udsættes til næste Aar.
2) Amtmanden anmodes om at gøre de kommunale Styrelser bekendt med nærværende Betænkning og tilvejebringe Oplysninger om:
a) hvor mange Personer der er tildelt Alderdomsunderstøttelse samt Bidragenes Størrelse i 1924.
b) Udtalelse fra Forstanderskabene om Betimeligheden af Aldersrentelovens Ikraftsættelse i ordret Form her paa Øerne.
c) Ændring af den nugældende Lov af 1881 om Alderdomsunderstøttelse.

Det kommunale Udvalg, den 10. Sept. 1924.

O. F. Joensen, Joh. H. Poulsen (m. F.) M. Samuelsen (m. F.).«

Punkt 2 a fall, 2 b fekk 17 atkv., 2 c fall.

Aftur varð ellisrentumálið dripið av fhaldsins flokkum!

Løgtingstíðindi 1925.

1. Lov om Invalideforsikring.
(Vit taka bara uppskotið.)

— — —

I Henhold hertil tillader Udvalget sig at foreslaa til Tingets Vedtagelse:

Spørgsmaalet om Invalidelovens Ikrafttræden paa Færøerne udsættes indtil videre.

— — —

Den 19. August foretoges Sagens 3. Behandling. Udvalgets Forslag sattes under Afstemning ved Navneopraab og vedtoges med 15 Stemmer. (Nej stemte Debes, Konoy. Stemte ikke: Johs. Joensen, Wang. Fraværende Patursson, M. D. á Ryggi, O. F. Joensen.

Soleiðis viðtók Johan Poulsen, A. Samuelsen og aðrir at skrinleggja invaliturentumálið. Hvat siga veljararnir hjá hesum monnum í dag, nú teir svart á hvítum síggja sannleikan?

2. Lov om Aldersrente.
(Vit taka bara uppskotið.)

— — —

Man skal tillade sig at foreslaa Tinget at vedtage:

Sagen om Udvidelse til Færøerne af Lov om Aldersrente udsættes indtil videre.

Hetta uppskotið varð viðtikið, og var soleiðis ellisrentumálið skrínlagt av fhaldinum.

Processin var úti og tey gomlu og invalitarnir vóru latin í oyðumork av sambandinum.

Men tíbetur komu aðrar kreftur uppí leikin og tóku sær av málinum.

Herum gjøllari seinni.

(Framhald.)

Tey, ið ætla sær at keypa tað

føroyska jólaheftið

'FLYKRUR'

eiga at biðja um tað sum skjótast, av tí at upplagið longu er næstan uppi.

PRÍSUR: **1,50 KR.**

H. N. Jacobsens Bókahandil,
Tórshavn.

NB. Bíligasti mátin er at senda okkum 1,60 kr. í postmerkjum frammanundan, fyri at spara postkravgjald.

Møde om Grønland.

Adgang 50 Øre.

!!

Landsforeningen »Luk Grønland op« afholder offentligt Møde Tirsdag den 19. ds. Kl. 9. Eftm. i Sjónleikarhúsinum i Thorshavn.

- - Redaktør Damsgaard-Schmidt taler. - -

†

Agnas Øster,
á Tvøroyri.

Týsmorgunin kl 5 andaðist húsmóðir Agnas Øster. Við henni er farið eitt hitt trúgvasta menniskja, eg havi mott.

Mær rennir í huga tann dagin, eg á fyrsta sinni steig inn um hennara gátt fyri at biðja um hús:

Sum eg stígi inn, møtir mær í durunum smiður við smíðreiðskapum í hondunum. Tað var verðfaðir. Hann var við at bróta skilaveggir niður. Húsini skuldi uminnrættast og økjast.

Eg spyrji eftir húsfrúini og fái til svar, at hon ikki er inni, men at hon vildi verða skjót aftur. Eg seti meg niður á koksbríkina at bíða, men hugsaði tó við mær sjálvum, at míni ørindi mundi fara at vera nyttuleys av tí, at húsaumstøðurnar sýntist at vera ov trongar til at taka ímóti fremmandum.

Tá ið húsmóðir — soleiðis var hennara navn hjá mær frá fyrsta degi — kom, bar eg ørindi míni fram og loyvdi mær